Alt Landssjúkrahúsumráðið er roykfrítt



Í Gestalonini má ein vera heilt sjálvhjálpin - eingi røktarstarvsfólk eru, sí annars reglugerð fyri húsarhald á kunningarskjali ella á okkara heimasíðu. Ein lokaltelefon er á gongini, har ringjast kann til vakthavandi ljósmóðir, lokal 5302. Um ringt verður við egnari fartelefon: ring 304500 og bið um lokal 5302. Eisini er tráðleyst internet .



Vit ynskja tykkum eitt gott uppihald í Gestalonini

Landssjúkrahúsið

www.ls.fo

# Gisting í Gestalonini




Landssjúkrahúsið

www.ls.fo

## Gestalonin

Á Eirargarði standa fýra stórir bygningar á seks hæddir hvør.
Gestalonin er í bygningi nr. 4.



Barnakonur, ið koma langvegis frá og ikki nýtast at verða innlagdar, men ynskja at vera nærhendis Landssjúkrahúsinum, hava møguleika at fáa íbúð/kamar saman við manni og børnum upp til tvær vikur áðrenn termin ella eftir avtalu.

Gistingin er ókeypis, tó skal gjaldast, eftir at mamman hevur átt. Prísurin er tá kr. 200,- fyri pápan og kr. 50,- pr. barn fyri náttina.



Tað eru ljósmøðurnar, sum bíleggja íbúð/kamar. Lykilin, saman við kunning, skal heintast hjá Leiðbeining í Forhøllini, tá opið er (07.00-21.00). Goldið verður fyri lykilin - kr. 300,- sum verður endurrindað við fráferð.



Í íbúðini er køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, seingjar- og handklæði. Eisini er ein barna weekend-song.

## Matur

Í Køkinum (Eirargarður 7) ber til at keypa mat. Eisini ber til at keypa ymiskt leskiligt í hugnaligum umhvørvi í kaféini í Forhøllini



**Upp– og afturlatingartíðir í kaféini:**
Mána- fríggjadag: 08.00 – 20.00
Leygardag: 10.00 – 20.00
Sunnudag: 14.30 – 20.00

